Eitt lítið virki á Strondum legði øll hini afturum

Vaðhorn á Strondum er eitt lítið virki við einum fíggjarligum úrsliti, sum skarar framúr

ÁRSINS VIRKI
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Vaðhorn á Strondum er eitt lítið fiskavirki. Men tey, sum arbeiða har, eru sera dugnalig.

Tað fingu tey prógv fyri fíggjadagin.

Tá varð Vaðhorn valt til ársins virki 2003

Tað er Vinnuhúsið sum velur ársins virki. Og hesuferð varð enntá ongin ivi um, at Vaðhorn skuldi hava heiðurin í ár.

Vinnuhúsið hevur lagt dent á, at velja eitt virki, sum hevur havt eitt gott fíggjarligt úrslit og sum er sterkt og støðugt.

Hini árini hava tað verið stór virki, sum hava fingið heiðurin at kalla seg ársins virki. Men í ár er tað eitt lítið, sum legði øll hini afturum og fór við heiðrinum og æruni.

Vinnuhúsið heldur, at Vaðhorn er eitt virki, sum við ógvuliga hepnari hond hevur lagt seg eftir at virka eina serliga vøru

Tað er onki nýtt, at nógv virki í fiski- og alivinnuna í Føroyum hava góð úrslit einstøk ár.

– Men tað eru fá virki, sum eftir støddini hava eitt so gott rakstrarúrslit at vísa á, ár eftir ár, sum Vaðhorn Seafood á Hulki á Strondum.

– Góðu úrslitini stava ikki frá, at virkið hevur funnið eitt loynimið, sigur Vinnuhúsið.

Heldur er uppskriftin, at tað hevur lagt seg eftir at gera eina serliga vøru til nakrar úrvaldar keyparar. Og eftir hesum hevur virkið lagt alt sítt virksemi til rættis.

– Virksemið hjá Vaðhorn er lagað eftir ynskjunum hjá kundunum, og við einum nútímans hugtakið kann virkið sigast at vera eitt "just in time" saltfiskavirki.

– Virkið hevur dugað at bygt upp eitt dygt samstarv við útlendskar keyparar og tað hevur dugað at laga innkeyp og framleiðslu eftir teirra eftirspurningi. Og so hevur tað dugað at hildið fast í teir góðui keypararnar.

Jan Mortensen úr Vinnuhúisinum, vinstrumegin, handar Jógvani Gregersen prógvið fyri, at Vaðhorn á Strondum er ársins virki í 2003. Kjartan Kristiansen, sum situr dómsnevndini, hyggur at

Gingið á odda

Saltfiskur er ein gomul siðbundin vøra, men tey hava verið mong, sum spáddu at henda vøra fór at fara í søguna.

– Men føroysku virkini, har ímillum Vaðhorn, hava gingið á odda at endurnýggja øll liðini í hesi vøru, heilt frá rávøru til keypara, so at hon hóskar til nútímans brúkaran.

Og framum nakran hevur Vaðhorn dugað at fingið fíggjarlig úrslit burtur úr tí sera góða umdømi, sum føroyski saltfiskurin hevur á marknaðunum í Suðurevropa.

Samstundis hevur Vaðhorn eisini havt hegni at tryggja sær tað neyðuga gjaldføri til keyp, virking, goymslu og flutning.

– Úrslitið hjá virkinum fyri hvørt kilo av ráfiski skarar framúr, sammett við onnur fiskavirki, og dómsnevndin hjá Vinnuhusinum sigur tí, at hon ivaðist sostatt ikki í at velja Vaðhorn Seafood til ársins virki 2003.

Ársins virki

Nú Vinnuhúsið hevur fyri nøkrum árum síðani gjørdi av at velja ársins virki einaferð um árið, eru nakrar treytir settar upp, sum ársins virki skal lúka.

Treyturnar eru hesar:

1) Virkið skal hava víst framfýsni og áræði innan eitt nú útflutning, vørumenning tøknifrøði, útbúgving, ella innan annað øki, og hetta skal eftir styttri áramál hava viðført menning og vøkstur.

2) Virkið skal hava verið støðugt/vaksandi, og dentur verður lagdur á fíggjarligt úrslit seinastu árini.

3) Virkið skal vilja trína alment fram sum vinnari av kappingini sum Ársins virki.

Eitt herðklapp til arbeiðsfólkið

– Hetta er eitt herðaklapp til arbeiðsfólkið hjá okkum. Tað er ikki ofta, at fiskafólk fáa eina viðurkenning, so tað eri eg fegin um, sigur Jógvan Gregersen, stjóri á Vaðhorn

ÁRSINS VIRKI

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

–Hetta er fyrst og fremst eitt herðaklapp til arbeiðsfólkið hjá okkum.

Vaðhorn a Strondum kann ikki sigast at vera eitt stórt fiskavirki. Eini 40 fólk arbeiða á virkinum.

Men hóast tey eru smá, eru tey røsk. So røsk, at Vinnuhúsið hevur valt Vaðhorn til ársins virki 2003.

–Hetta er ein heiður, sum eg eri ógvuliga fegin um, sigur Jógvan Gregersen, stjóri á virkinum. Og hetta er eisini ein heiður, sum eisini arbeiðsfólkini fegnast um.

Og júst tað heldur stjórin er tað stóra í hesum, at arbeiðsfólkið hevur fingið eina viðurkenning.

–Hetta er eitt herðaklapp til okkara arbeiðsfólk. Tað er ikki so ofta, at fiskafólk fáa eitt herðaklapp fyri teirra arbeiði, so tað fegnist eg um teirra vegna, sigur hann.

Hetta er dómsnevndin, sum hevur valt ársins virki. Frá vinstru eru teir Arni Poulsen aðalstjóri í Vinnumálaráðnum, Hjalmar Petersen, stjóri á trolvirkinum, Vónini, Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, Marner Jacobsen, stjóri í Føroya Sparikassa og Kjartan Kristiansen á Menningarstovuni

Lunnarnir lagdir á Eiðis Fiskavirking

Vaðhorn hevur havt eina umskiftiliga tilveru.

Tað var Petur Reinert, sáli, sum legði lunnar undir virkið norðuri á Eiði seinast í sjeytiáruum.

Seinni varð virksemið flutt inn á Skála, men í kreppuni fór Vaðhorn sama veg, sum næstan øll hini fiskavirkini.

Valið stóð so ímillum at fara upp í Fiskavirking ella at standa uttanfyri.

Vaðhorn kom at standa uttanfyri og flutti út á Hulk, har tað varð endurstovnað í 1995 við nýggjum partaeigarum og einari millión í eginpeningi.

–Og tað má sigast at hava hepnast væl, tí nú er eginpeningurin 21 milliónir.

Jógvan Gregersen sigur, at arbeiðsetningurin er enn tann sami sum hann var tá ið virkið byrjaði seinast í sjeytiárunum, hóast framleiðslan er meiri nýmótans nú, enn hon var tá.

Hann heldur, at ein styrki hjá Vaðhorn er, at tað er eitt virki, sum bara arbeiðir saltfisk.

Tað ger virkið burturúr toski, brosmu og longu.

Men ein fortreyt fyri tí er, at virki kann fara á eina uppboðssølu at keypa akkurát tann fisk, sum brúk er fyri.

Støddin er ein styrki

Stjórin heldur eisini ,at tað er ein styrki, at virkið er so lítið.

–Tað er ikki neyðugt hjá okkum at ekypa fisk, hvørja viku.

Sostatt ber til at laga innkeypið eftir umstøðunum Og so er virkið so lítið, at tað er nógv lættari at stýra framleiðsluni , samstundis sum tað er skjótt at laga virksemið til broyttar umstøður.

–Vit leggja okkum eftir at virka ta vøru, sum keyparin vil hava. Vit hava ein úrvaldan skara av keyparum í Spania og Italia.

Hetta eru ikki so stórir keyparar og teir keypa ímillum fimm og 20 tons hvørja ferð.

Jógvan Gregersen sigur, at tey hava rættiliga gott samskifti við keyparan. Hetta eru viðurskifti, sum í stóran mun byggja á álit, har eitt orð er eitt orð og ein maður er ein maður.

–Àlit ímillum keypara og seljara er grundarlagið undin øllum handli, so tað leggja vit stóran dent á.

Góðu viðurskiftini við viðskiftafólkini bera eisini í sær, at Vaðhorn gongur langt fyri at ganga teimum á møti.

–Ringir eitt viðskiftafólk og vil hava eina ávísa vøru, virka vit hana.

– Afturfyri tingast keyparin sjálvdan nakað serligt um prísin, men rindar tað fyri vøruna, sum vit halda, at vit mugu hava fyri hana.

Men so skal rávøran heldur ikki gloymast.

– Føroyskur saltfiskur hevur sera gott orð á sær. Hann hvítur og tjúkkur og tí er hann ógvuliga høgt í metum hjá keyparunum.

Hinvegin letur Jógvan Gregersen ikki so væl at fiskinum í ár.

– Tað tykist sum um at hann ongantíð er komin fyri seg aftur eftir gýtingina í vár og tað er rættiliga nógvur slánur ímillum sigur hann.

Samstundis er kappingin harðnað so í ár verður úrslitið ikki so gott sum í fjør.

Vaðhorn keypir ímillum 2.500- 3.000 tons av fiski um árið. Burturúr tí fáa tey eini 1.200 tons av saltfiski.

Lítil fyritøka reisir ein vara í føroyskum vinnulívi

Føroyska KT fyritøkan, Formula Føroyar, hevur gjørt eina skipan, sum hevur vakt áhuga hjá einum av allarstørstu risunum í altjóða vinnulívinum yvirhøvur.Talan er um týsku fleirtjóða fyritøkuni, Siemens, sum nú skal marknaðarføra hesa skipanina hjá føroysku KT fyritøkuni.

Vinnuhúsið heldur, at hetta er størsta frambrotið í føroyskum vinnulívi í ár. Tí hevur Vinnuhúsið kosið samstarvið ímillum Formula Føroyar og Siemens til ársins átak í føroyskum vinnulívi í ár. Hetta varð avdúka á vinnudegnum í Norðurlandahúsinum fríggjadagin.

Í blaðnum í morgin hava vit meiri um tað.

Reingerðarfólk
til slaktaran í SMS

Slaktarin í Miklagarði í SMS sóknast eftir reingerðarfólki at byrja skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er sett til 2 tímar um dagin eftir at stongt er frá mánadag til leygardag - aðru hvørja viku.

Løn sambært galdandi sáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til slaktaran í Miklagarði, Jørgen Jørgensen á tel 217404.

Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 vørunummrum. Í Miklagarði starvast uml. 80 fólk.

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11

Starvsffólk
til bakaran í SMS

Til bakaran í SMS søkja vit eftir kassafólki at arbeiða skiftandi tíðir at byrja skjótast tilber.

Løn sambært galdandi sáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til Miklagarð á tel 31 30 11 og spyr eftir Johnny Priess.

Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 vørunummrum. Í Miklagarði starvast 80 fólk.

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11